**EYKADEILIR**
til Yamaha FS1 til sølu.
*Tlf. 264797*

**PUCH KNALLERT**
Er tað nakar, ið liggur inni við einari gamlari Puch knallert VZ ella MS, so eri eg áhugaður.
*Tlf. 217634*

## Teldur

**TELDA TIL SØLU**
2500+ MHz AMD preocessari, 512 MB DDR Ram, 160 GB harddiskur, Radeon 9000 family skermkort, CD-R-RW brennari, 17" skermur, LAN 100 Mbit, tráleyst Internet kort, flott lýsandi kabinett. Selist samlað fyri 8.000 kr.
*Tlf. 250297/319604, Hjalti*

**TIL SØLU**
PC-spæl Tetris útgáva, fyri DOS. eitur Wordtris, við kvittan. Nýprísur 100 kr. (frá 1994) Hvat vilt tú geva.
*Tlf. +45 86448627/ +45 26747474*

**HEVUR NAKAR**
eitt Saga spæl at selja mær?
*Tlf. 210560*

**X-BOX**
frá 2004 við 2 joystikkum og 4 spølum til sølu fyir 1700,-
*Tlf. 318415/218415*

**TOSHIBA SATELLILTE A10**
Pentium 4, 2,4Ghz. Windows XP Home, 30Gb hardisk, 512Mb ddr-ram, 2USB, PCMCIA Slot, 64Mb internt grafikkort, DVD-rom drev, 14" skerm, SounMax Digital Audio Ljóðkort. Tilhoyr: Taska, mús og tráðleyst netkort(PCMCIA). Teldan er sum nýggj, bert 8 mánaðar gomul. 6900 kr.
*Ring á tlf: 321775/508575*

**HJÁLP TIL TELDUNA**
Vit hjálpa tær við smáum sum stórum, fyri fastan prís, 150 kr. Hoyr nærri á tlr. 318053 millum kl. 17 og 19 allar dagar.
*Tlf. 318053, kl. 17-19*

**FARTELDA TIL SØLU**
2 mánaðar gomul Dell Inspiron 510M. Microsoft Windows XP Home Edition. Intel® Pentium® M processor 1.6 GHz - 15'' XGA LCD skerm. 1024Mb 333MHz DDR RAM - 40GB IDE (5.400 RPM) Hard drive. 24x CD-RW/ 8x DVD Combo - 2100 Intel® ProWireless card. Dell Delux leðurtaska. Til sølu vegna feilkeyp. Prísur 9.000 Kr.
*Tlf. 217223 E-mail: joanneslost.olivant.fo*

**BLEKK PATRÓN**
til HP 350i og HP 350CBi óbrúkt. Til sølu fyri 250 kr.
*Tlf. +45 86448627 og +45 26747474*

**TIL SØLU VEGNA FLYTING**
Ein 1 ára gomul tleda, 3,0 GHz, 120 GB Harddisk, 512 Mb Ram, 128 Mb grafikkort, TV-kort, 10/100 Lan, Hp all in one Printari, 19" skermur, 7,1 Surround, mús og tastatur. Ring og gev eitt boð.
*Tlf. 264705*

## Tónleikur

**HEVUR NAKAR**
eitt trummusett, ella partar av einum, sum ikki verður brúkt longur, vil eg fegin frætta nærri.
*Tlf. 314567*

**TRUMMUSPÆLARI**
Trummuspælari søkist til bólk í Eysturoynni, skjótast gjørligt.
*Ring og hoyr nærri á tlf: 261948 & 441548*

**TRUMMUSETT**
Pearl Target, sum nýtt, til sølu. Ring til Flóvin
*tlf. 253167 ella 371844*

**BLÁUR EL-GUITARI**
Fender telecaster thinline til sølu. Prísuppskot kr. 6.000,- húsi fylgir við.
*Tlf. 322241 ella 271935*

**EG EIGI FLØGUR**
og LP, danskar og útlendskar. Eg leiti eftir føroyskum fløgum. Hvat vilt tú hava aftur?
*Tlf. +45 86448627 og +45 26747474*

**TIL SØLU**
El-guitar við forsterkara 3.000,- kr.
*Tlf. 224986*

## Út- & Sjónvarp

**ANLEGG TIL SØLU**
Panasonic anleg til sølu fyri 2000 kr.
*Tlf. 373854/255533*

**SJÓNVARP TIL SØLU**
33" Thomson sjónvarp v/borði til sølu fyri 9.000 kr.
*Ring 361178 eftir kl. 18*

**STEREOANLEGG**
Eitt Philips stereoanlegg til sølu fyri 3.500,- Nýprísur 6.500,- 6 mðr. gamalt.
*Tlf. 584171, eftir kl. 12 257401*

**RADIO YNSKIST**
Hevur onkur eitt radio at selja mær frá uml. 1975 vil eg gjarna keypa tað. Helst Tandberg ella Philips.
*Tlf. 319613*

**SONY SJÓNVØRPA**
VPL-ES2, óbrúkt, prísur 8.500,-
*Ring 316657*

**DIVX DVD SPÆLARI**
av merkinum Dantax, til sølu fyri 1500 kr.
*Tlf. 254705*

**DVD SPÆLARI TIL SØLU**
Euroline DVD spælari til sølu fyri bert 300 kr.
*Tlf. 254705*

## Ymiskt

**DVD TIL SØLU**
Panasonic dvd afspælari av besta kvaliteti nýprísur uml. 3800 kr nú 1500 kr við dvd filmun.
*Tlf. 220405*

**TIL SØLU**
Nógvir góðir vhs filmar orginalir.
*Tlf. 220405*

**HEVUR TÚ VÁNALIGT SIGNAL**
á mobiltlf. So havi eg nakrar antennu-forsterkarar. Passa til øll merkir og virka sera væl
*Tlf. 272908*

**FARTELEFON TIL SØLU**
Fartelefon til sølu, ein Siemens MC60 hevur litskýggja, polyfoniskar ringitónar, myndatól, mms og GPRS. Prísur 800 kr.
*Tlf. 263941/315741*

**VIT FARA AT HAVA**
eina stuðulskonsert til frama fyri skóta landslegu í Danmark við vælumtókta Magna Christiansen og kirkjukórinum í Vestmanna í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið 29. januar kl. 20.00. Eisini fara vit at selja lutaseðlar. Møti fjølment. Øll eru hjartaliga vælkomin. Børn atgongd saman við vaksnum.
*KFUM-Skótarnir í Kvívík*

**NÚ FER AT NÆRKAST**
Vit fara at hava páskareggja tombola við 600 páskareggum í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 27. februar kl. 16.00. Øll eru vælkomin.
*KFUM-Skótarnir í Kvívík*

**TIL SØLU**
Komplett sett manual, spælireglur v.m. frá Donsku Tipstænastuni til sølu fyri 100 kr.
*Tlf. +45 86448627/+45 26747474*

**NAVNAKAPPINGIN**
Nú styttist til 1. februar tá uppskotið um navnið á tí nýggja 5 mannafarinums kal vera inni. Vinningurine r 1.000 kr. Royn og finn eitt gott uppskot og send tað inn.
*Strálan, 490 Strendur*

**EIGUR NAKAR**
3 atgongumerkir til Fólk og Dólgar at selja mær, so vinarliga ring
*tlf. 222308*

**FARTELEFON TIL SØLU**
Ein Samsung E 700 fartelefon, við myndatóli, til sølu fyri bara1400 krónur.
*Tlf. 251946*

**HUGNAKVØLD Í »SKÁLANUM«**
í Klaksvík. Leygarkvøldið 5. februar kl. 20 skipar stuðulsfelagið Dragin fyri árliga hugnakvøldinum við borðhaldi, sangi og dansi í Skálanum. Frá kl. 23 verður dansur, har bólkurin »Flúrar« úr Havn spælir. Tilmelding til borðhaldið í seinasta lagi hósdagin 3. februar á tlf. 456661 og 456282.
*Stuðulsfelagið Dragin*

**PLAST VINDEYGA**
til sølu, 198 x 145 bíliga til sølu.
*Tlf. 441309/441412*

**VHS FILMSAMLING TIL SØLU**
fyri 700,- kr.
*E-mail: tof82@yahoo.com*

**TIL SØLU**
Video kamera av merkinum Sony, video8, ongantíð brúkt, sum spildurnýtt, við tasku. Einans 1.500,-
*Tlf. 252829*

**NÝTT DIGITAL KAMERA**
Finepix F402 við 16MB korti og software til sølu fyri kr. 1900,- Nýprísur, sí pricerunner.dk
*Tlf. 322241 ella 271935*

**GRÍMA!**
Ein grøn gríma við stjørnumynstri støðd »Full« til sølu fyri 100 kr.
*Tlf. 224297*

**YNSKIST**
7 stk massivar fyllingsinnhurðar ynskjast. Hurðastødd: 725 x 2040mm, v/ karmi støðd 786 x 2089mm. málað/lútað ongan týdning - eftirsum tær skulu málast.
*Tlf. 584342*

**TIL SØLU**
Ein Siemens c 45 fyri 500,-kr og ein Sony t610 fyri 1.400,-kr v.tasku sum nýtt
*Tlf. 272908*

**SOLARIUM TIL SØLU**
Gott Silver Sonic Solarium við 28 rørum og andlitssól til sølu fyri 1000 kr.
*Tlf. 213213*

**SAMSUNG V-200**
Til sølu, bert 15 mðr gomul. Alt tilhoyr er við + eyka battarí. Til sølu fyri 1800,-
*Ring á tlf: 321775/521775*

**BYRJA FYRI TEG SJÁLVA**
Nýggj slankimaskina líknandi henni Bayline brúkar, til sølu við stórum avsláttri vegna plásstrot.
*Tlf. 227993*

**TIL SØLU**
Eitt stórt solarium til útleigan við 32 stórum rørum og 9 smáum til sølu.
*Tlf. 452089*

**VINDEYGU TIL SØLU**
1 stk. h. 130 x b. 110.
3 stk. h. 120 x b. 130.
1 stk. h. 130 x b. 130.
og eitt Velux takvindeyga 70 x 55 bíliga til sølu.
*Tlf. 503249*

**HEY HEY!**
Nú fer at nærkast: Vit fara at hava páskareggja tombola við 600 páskareggum í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 29. februar kl. 16.00. Øll eru vælkomin.
*KFUM-skótarnir í Kvívík*

**HEY HEY**
Vit fara at hava eina stuðulskonsert til frama fyri skóta landslegu í Danmark við vælumtókta Magna Christiansen og Kirkjukórinum í Vestmanna, í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið 29. januar kl. 20.00. Eisini fara vit at selja lutaseðlar. Møti fjølment. Øll eru hjartaliga vælkomin. Børn atgongd saman við vaksnum.
*KFUM skótarnir í Kvívík*

**FØSTULÁVINTSVEITSLA**
Føstulávintsveitslan verður í ítróttarhøllini leygardagin 5. februar.
*VÍF*

**SMS CHATBOARD**
óbrúkt til Nokia 51xx og 61xx modellir, góð til m.a. SMS, telefonbók v.m. til sølu fyri 150 kr.
*Tlf. +45 86448627 og +45 26747474*

**TIL SØLU**
Battarí til Nokia tlf. til sølu fyri 50 kr.
*Tlf. +45 86448627 og +45 26747474*

**GRUNDØKIÐ**
á Strondum, 600 fermetrar, við tilhoyrandi felagsjørð ca. 2200 fermetrar.
*Tlf. 258360/441483*

**TIL SØLU**
Ein Nokia 3100 er til sølu, eitt kamera og eitt cower fylgir við, 900,- kr.
*Tlf. 319030*

**YNSKIST TIL KEYPS**
Innhurð við rúti ynskist bíliga til keyps. Mát 81,5 x 200 cm.
*tlf. 422612/254266*

**ÍTRÓTTARFÓLK**
sum skulu uppbyggja vøddarnar, t.d. rógvarar, bodybuildarar o.t. hava brúkfyri kosttilskoti. Nóg mikið av proteinum og kreatin er umráðandi til hetta. Nærri fæst at vita á
*tlf. 282870*

**ÁRSVEITSLAN**
hjá Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdarfelagnum Varðanum. Ársveitslan verður í bygdarhúsinum leygarkvøldið 12. februar kl. 19.30. Allir hósvíkingar úti og heima eru vælkomnir. Veitslan kostar 180 kr. Seinasta freist at keypa sær atgongumerki er mánakvøldið 7. februar kl. 22.00 í handlinum hjá Jóannesi. Borðreitt verður við feskari súpan, lambskjøti og oman ís við frukt. Góður dansur og skemt.
*Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdarfelagið Varðin*

**SUNDA PENSIONISTAFELAG 20 ÁR**
Í sambandi við at Sunda Pensionistafelag hevur 20 ára stovningardag, verður hugnaløta 3. februar 2005 kl. 18.30 í Eydnuni á Oyrabakka fyri limun og innbodnum. Sigast skal frá luttøku í seinasta lagi 28. januar á telefon 423357 og 422055.
*Nevndin*

i Sosialurin

# Almennur fyrilestur á Fróðskaparsetrinum



*Hesaferð verður tað Uni Kárason Petersen, sum fer at halda fyrilestur á Fróðskaparsetrinum*

**FYRILESTUR**
*tíðindaskriv*

Fjórði fyrilesturin í røðini »Myndlar og tøl«, sum Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag skipa fyri, verður hóskvøldið 27. januar, tá ið Uni Kárason Petersen, Ph.D-studentur á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum heldur fyrilesturin »Seismiskar kanningar á Glyvursnesi«. Fyrilesturin verður klokkan 20 í Ovastovu í Nóatúni 3.

Á sumri 2003 var nógv kanningarvirksemi á Glyvursnesi. Kanningarnar vóru partur av SeiFaBa átakinum (Petrophysical and Seismic Properites of Faroes Basalts). Átaki er fíggjað av Sindri bólkinum. Sindri bólkurin varð settur á stovn í samband við fyrra útbjóðingar umfarið og er fíggjaður av teimum oljufeløgum, sum tá fingu leitingar loyvi í Føroyum. Endamálið hjá bólkinum er at stuðla tiltøkum, sum hava týdning fyri framhaldandi oljuleiting í Føroyum.

Fyrilesturin greiðir frá kanningunum, sum eru gjørdar higartil. Kanningarnar vóru gjørdar í samstarvi millum Fróðskaparsetrið, Cambridge University, Oxford University, Århus Universitet og Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelse (GEUS).

Basalt ger tað trupult at leita eftir olju á Føroya leiðini. Seismiskar kanningar hava ilt við at mynda tað, sum er undir basaltinum. Hesin trupulleiki verður millum fakfólk róptur The Sub-basalt imaging problem. Endamálið við SeiFaBa átakinum er at kanna eginleikarnar hjá basaltfláum og hvussu seismikkur ferðast gjøgnum fláirnar.

Tað serliga við at gera kanningar á landi í Føroyum er, at her verður seismikkurin skotin beinleiðis inn í basaltfláirnar, og mátingar eru gjørdar beinleiðis á basalti. Umframt at dátuni beinleiðis kunnu nýtast til at lýsa, hvussu seismikkur ferðast í basaltfláunum so kunnu dátuni saman við aðrari vitan innan jarðfrøði nýtast til at menna eitt model til simulering av, hvussu seismikkur ferðast í basaltfláum. Við einum tílíkum modelli ber til við simuleringum at kanna seismik í basaltfláunum undir skipaðum umstøðum og royna, hvussu ymiskir hættir at viðgera dátu kunnu betra um endaligu dátuni.

Uni Petersen er útbúgvin cand.scient. í jarðalisfrøði frá Københavns Universitet í 2002 og fór í 2002 undir Ph.D. lestur innan jarðalisfrøði á Náttúruvísindadeildini, Fróðskaparsetri Føroya.